## Nýggj ferðaætlan 1. apríl

**Samferðsla:** Í longri tíð hava fólk hjá Strandferðsluni arbeitt við at fyrireika nýggju ferðaætlanina, sum skal galda tað komandi árið.

Henda ferðaætlanin hevur verið til viðgerð og hoyringar, og er nú so mikið liðug, at hon er nærum klár at fara til prentingar.

Á Strandferðsluni fegnast samskiparin, Andras Jensen, um viðmerkingarnar, sum eru komnar.

– Arbeiðið hevur gingið sera væl, og tí skuldi alt tala fyri at hon kann koma í gildi 1. apríl, sigur hann.

sb.

## J&K sambinda Landssjúkrahúsið

**Havn:** Tilboðini uppá samanbindingina av nýggja og gamla bygninginum hjá Landssjúkrahúsinum vórðu upplatin mánamorgunin.

Eftir hesi átti fyritøkan J&K lægsta tilboðið og bjóðar sær til at gera sambindingina fyri slakar 5,7 mió kr., meðan Demich kann gera ventilasjónina fyri slakar 4,4 mió. kr.

Tummas Eli Hansen var lægstur við el-arbeiðinum og kann gera tað fyri 2,4 míó. kr., meðan Henning Sørensen kann gera málaraarbeiðið fyri 182.000 kr. og Litaval gera gólvarbeiðið fyri slakar 450.000 kr.

Oyvind Brimnes, stjóri hjá Landsverki upplýsir, at teir nú fara undir at samráðast við feløgini, sum áttu lægstu tilboðini. So skjótt sum allar avtalur eru klárar, kann arbeiðið byrja, vónandi um ein mánað.

Ætlanin er, at arbeiðið skal verða liðugt í ár.

sb.

## 20 føroyingar til NZ

**Fiskivinna:** Tað beit beinanvegin á hjá New Zealendska reiðarí'num Amaltal.

Teir lýstu her í blaðnum eftir føroyskum fiskimonnum, og beint eftir páskir fara teir fyrstu føroyingarnir avstað at royna eydnuna sum fiskimenn á Suðurhálvuni.

Tað skilst, at einir 20 føroyingar hava fingið kjans við frystitrolarunum hjá reiðarí'num, og at einir fýra ella fimm verða við hvørjum skipi.

sb.

## Showmenn í Føroyahúsinum leygarkvøldið

**Leygarkvøldið 19. mars leggja Showmenn at í Keypmannahavn og fara at spæla til dans**

UNDIRHALD
*Tíðindaskriv*

Showmenn eru eitt tað heitasta navnið í Føroyum í løtuni í sambandi við Prix Føroyar, har teir hava Eyðun Nolsøe sum skipara. Nú fara teir at royna onnur mið og hava fingið eina avtalu um royndarfiskiskap í Føroyahúsinum.

Manningin verður sum vant Kim Hansen (keyboard og sang), James Olsen (trummur og sang), Jóhannes á Rógvi Joensen (bass) og Jens Marni Hansen (guitar og sang). Matrósurin Jens Marni sigur, at teir kanska eru í bestu venjing nakrantíð og lovar eitt ógloymandi kvøld. Teir hava, umframt at spæla við Eyðuni Nolsøe, spælt saman við Guðruni Sólju, men royna nú einsamallir. Tað skuldi ikki verið verri, tí teir hava tyngstu rútmugruppu og lættasta front í landinum. Við Kim sum skipara eru teir mest spælandi bólkur í Føroyum fyri tíðina. Jóhannes er kokkur og lovar eina góða portión av blandaðum tónleiki og eisini egið tilfar.

# Christianskirkjan og Alex hugtóku sendiharran

**Ein eftirhondini fastur táttur í sambandi við vitjanir býráðsins er at uppliva fyrrverandi skúlastjóra okkara, Alex Sólstein, sum við livandi frágreiðing og sangi í flottu Christianskirkjuni hugtekur hvørja ferð**

VITJAN
*tíðindaskriv*



*Tá kanadiski sendiharrin, Fredericka Gregory, í vikuni var á vitjan í Klaksvík, gekk leiðin m.a. niðan í Christianskirkjuna*

Hann er eftirhondini blivin ein lokalur umboðsmaður, Alex Sólstein, ið sum fyrrverandi skúlastjóri og lærari er málsligur snillingur burturav.

Tá kanadiski sendiharrin, Fredericka Gregory, í vikuni var á vitjan í Klaksvík, gekk leiðin m.a. niðan í Christianskirkjuna, har Alex greiddi sera hugtakandi frá teimum trimum metunum, kirkjan sermerkir seg við.

1 - Christianskirkjan er tann einasta kirkja í heiminum, sum hevur ein Fresco á lofrifti sum altarmynd.

2 - Christianskirkjan er tann einasta kirkja í heiminum, sum hevur skírnarfunt, ið upprunaliga er ein kanska 4000 ára goml offurskál. Henda offurskál hevur í fornum døgum staðið í einari heidnari offurlund.

3 - Christianskirkjan er tann einasta kirkja í heiminum, sum hevur ein bát hangandi í sannari støðd, sum eisini hevur verið í nýtslu.

Umframt hetta, so er ikki um at tala tað vakra og rúmliga hølið, ið kirkjan er, og sum eisini ger hana til eitt av best egnaðu konserthølunum í landinum.

Jú, ein sannur dýrgripur av einum bygningsverki, segði sendiharrin Fredericka Gregory. Hon fegnaðist um, at søgan úr Norðoyggjum og ímyndin av neystunum er hegnisliga sett saman til ein stað, har tú kennir teg væl.

Tá ið Alex Sólstein endaði sína frásøgn við at syngja: Nu flyr jeg til din nåde, sum hann plagar, ja so kundi kanadiski sendiharrin ikki bara sær - og eitt lítið tár rann eftir kinnum hennara, so hugtikin hon var.

Fredericka Gregory takkaði fyri framúr góða og áhugaverda frágreiðing um kirkjuna og søgu henara. Eisini fyri frágreiðingina um hvussu Føroyar varð broytt frá einum bóndasamfelagi, har báturin, sum hekk í kirkjuni, var álitið fyri føði og flutningi millum oyggjarnar, til nútíðar samfelagið, sum hóast framkomin vinnutól og alheims hugburð ikki hevði gloymt kirkjuna og samkomurnar.

# Diplomleiðarar brúka nýggja vitan beinanveg

**Fyritøkur og leiðarar fáa skjótan og málrættaðan ágóða av at senda fólk á diplomleiðaraútbúgving. Grundreglan er, at fólk í útbúgvingarskeiðinum skulu taka støðu til nýggju vitan sína og seta hana í verk á arbeiðsplássinum. Skeiðsdepilin fer nú undir nýtt útbúgvingarskeið og skipar samstundis fyri kunnandi fundi um útbúgvingina**

ÚTBÚGVING
*Tíðindaskriv*

Tey, sum taka útbúgving sum diplomleiðarar á Skeiðsdeplinum, hava seg sjálvi sum case. Ongin orsøk er at brúka hugsaðar støður og trupulleikar sum útbúgvingarevni, tá tey lesandi í staðin kunnu nýta sítt egna starv og arbeiðspláss sum case.

Diplomleiðaraútbúgvingin er ein spennandi og øðrvísi háttur at læra at gerast ein enn betri leiðari. Stóri fyrimunurin er, at fyritøkan ella stovnurin, sum sendir leiðarar í útbúgving, beinanvegin fær ágóðan av nýggju leiðsluvitanini. Undirvísingin tekur nevniliga beinleiðis støði í gerandisdegnum hjá leiðaranum og fyritøkuni.

Útbúgvingin á Skeiðsdeplinum tekur tvey ár og er serliga góð barlast hjá leiðarum, sum hava arbeitt við leiðslu uttan tó at hava útbúgving innan starvsfólkaleiðslu. Skeiðsluttakararnir møta ein dag aðru hvørja viku til undirvísing og prát um vinnuroyndir hvør hjá øðrum.

### Heildarinnlit í leiðslu

Í stuttum er endamálið við útbúgvingini at geva verandi og komandi leiðarum í privatum og almennum virkjum eitt heildarinnlit í leiðslufunktiónina. Innlitið skal kunna brúkast í dagliga arbeiðinum, soleiðis at leiðararnir kunnu røkja leiðsluleiklutin og uppgávur sínar á fullkønum grundarlagi tvørtur um vanlig yrkismørk.

Eftir lokna útbúgving skulu luttakararnir kunna:

- brúka serligar leiðsluog samstarvshættir
- styrkja sambandið millum leiðslu og starvsfólk við greiðum og uppbyggjandi samskifti
- finna menningarfaktorar á arbeiðsplássinum og tilhoyrandi umhvørvi og brúka ítøkiligar samskipanaruppgávur
- fremja ábyrgdarfulla og starvsfólkamennandi leiðslu
- seta mál fyri framtíðina og seta starvsfólkini inn í málini við ítøkiligum virkisætlanum
- finna persónligar eginleikar og harvið menningarmøguleikar hjá starvsfólkunum
- finna egnar leiðslueginleikar og menningarmøguleikar
- leiða góðskumenningina á virkinum

### Kunnandi fundur

Diplomleiðaraútbúgvingin, ið er stytt LÚ, byrjar í apríl, og tilmeldingarfreistin er tann 23. mars 2005. Longu nú er møguligt at tekna seg hjá Skeiðsdeplinum.

Kunnandi fundur um útbúgvingina verður á Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, 16. mars 2005 kl. 16:30. Har fáast allar upplýsingar um útbúgvingina, og har ber til at hitta onkran teirra, sum er vorðin diplomleiðari við Skeiðsdeplinum sum útbúgvingarstað.

Á heimasíðuni www.skeidsdepilin.fo eru innihaldslýsing og dagfestingar, og somu upplýsingar fáast við at ringja telefon 318813. Faldarin við útbúgvingum og skeiðum hjá Skeiðsdeplinum í ár eru til taks á heimasíðuni www.skeidsdepilin.fo. Upplýsingarnar fáast eisini við at ringja telefon 318813.